


Í mars í ár verður val til umboðsráðið í Eik Banka.

Atkvøðurætt hava allir partaeigarar, sum standa skrásettir í partabrævabókini 1. januar 2008.

Hvørt partabræv gevur eina atkvøðu til umboðsráðsvalið, tó hevur hvør partaeigari í mesta lagi atkvøður svarandi til 2,5 % av samlaða atkvøðutalinum.

Valbæri hava partaeigarar, ið standa skrásettir í partabrævabókini 1. januar 2008. Eingin, sum hevur starv ella álitisstarv hjá kappingarneyta hjá Eik, kann veljast í umboðsráðið, uttan við skrivligum samtykki frá nevndini í Eik.

Í vikuni 29. februar - 7. mars 2008 ber til at velja á øllum deildum hjá Eik. Seinasta høvi at velja er á sjálvum partaeigarafundunum, ið verða í teimum 7 umboðsdømunum, hesar dagar:

| | |
|---|---|
| 10. mars | Sandoy, Samljóð í Skopun |
| 11. mars | Suðuroy, Skúlahøllin í Trongisvági |
| 13. mars | Norðurstreymoy, Ítróttarhøllin í Kollafirði |
| 14. mars | Vágar, Bygdarhúsið í Miðvági |
| 25. mars | Eysturoy, Ítróttarhøllin í Runavík |
| 26. mars | Norðoyggjar, Skálin í Klaksvík |
| 27. og 28. mars | Suðurstreymoy, Ítróttarhøllin á Hálsi í Havn |

Berst tær frá at greiða atkvøðu í nevnda tíðarskeiði ella á partaeigarafundinum, kann atkvøðast við brævi. Atkvøðugreiðsla við brævi er í vikuni 29. februar - 7. mars 2008.

Partaeigarar, ið eru búsitandi uttanlands, kunnu stilla upp og velja í tí umboðsdøminum, har teir sambært skrásetingini hjá Eik seinast høvdu bústað í Føroyum.

Tú fært gjølligari upplýsingar við at seta teg í samband við eina av deildunum hjá Eik og við at vitja www.eik.fo.

Nevndin

www.eik.fo

VASTI 459010

Partaeigarafundirnir byrja kl. 19.00 og enda uml. kl. 22.30
Hølini lata upp kl. 18.00

STARVSLÝSING

## Avloysari fyri kunningarfólk

Fyri kunningarráðgeva okkara í barsilsfarloyvi verður søkt eftir avloysara at byrja 1. mai og eitt ár fram.

**Arbeiðsuppgávur**
Starvið fevnir í høvuðsheitum um, í samstarvi við stjóran og leiðsluna og umvegis ymiskar miðlar, at skapa opinleika og vitan um dagliga virksemi hjá Landsverki, soleiðis at fólk fáa møguleikan at fylgja við og samstundis fáa eina greiða mynd av Landsverki.

Kunningarráðgevin arbeiðir somuleiðis fyri einum „konstruktivum" samstarvi við fjølmiðlarnar og syrgir fyri, at Landsverk altíð er til reiðar at veita fjølmiðlunum teir upplýsingar og tað tilfar, teimum tørvar.

At enda er kunningarráðgevin ein tænastuveitari til allar deildir hjá Landsverki, t.d. tá ið kunnandi tilfar skal framleiðast í sambandi við framløgur, ráðstevnur, lýsingarátøk o.a. Kunningarráðgevin tryggjar, at alt kunnandi tilfar frá Landsverki er umboðandi fyri stovnin – bæði í formi og innihaldi.

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, og sum gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Kunningarráðgevin vísir beinleiðis til stjóran.

**Førleikakrøv**
Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og royndir, helst innan omanfyri nevndu øki, og duga væl at málbera seg skrivliga, serliga á føroyskum.

Tað er umráðandi, at tann, ið settur verður, hevur góð samstarvsevnir, hugflog, dugir at arbeiða miðvíst, sjálvstøðugt og ábyrgdarfult og er til reiðar at royna nýggjar avbjóðingar, um tað skal verða. Góður kt-kunnleiki er ein treyt.

**Setanartreytir**
Løn og setanartreytir annars vera sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum og lívsgongdarlýsing (cv) verða at senda Landsverki, Postsmoga 78, 110 Tórshavn ella til lv@lv.fo og skulu verða skrivstovuni í hendi í seinasta lagi 18. februar 2008. Merkið umsóknina „Kunningarfólk" og viðmerk í umsóknini, hvar tú hevur sæð lýsingina.

Nærri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Oyvindi Brimnes, stjóra, á fartel. 540 801 ella umvegis teldupostin ob@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

MVH P/F | Á HJALLA 15 | TELEFON 363800

MVH
MASKINVERKSTAÐURIN Á HJALLA

# VERKFØRARI TIL MVH

Verkførari okkara á maskinverkstaðnum á Hjalla ynskir at royna nýggjar avbjóðingar. Tí verður sókt eftir nýggjum verkførara til maskinverkstaðið.

**Arbeiðsøkið**
Sum verkførari hevur tú ábyrgdina av at tilrættaleggja arbeiðið á maskinverkstaðnum. Ein onnur týðandi uppgáva er at samskifta við viðskiftafólk, veitarar og goymslustarvsfólk. Eisini hevur tú ábyrgdina av, at arbeiðs-og papírsgongdin er so skjót og smidlig sum tilber.
Í løtuni eru 6 starvsfólk á verkstaðnum.

**Tín førleiki**
Vit søknast eftir einum persóni við útbúgving og royndum innan maskinøkið. Hevur tú, umframt hendan førleika, vunnið tær annan ástøðiligan førleika, sum t.d. maskinmeistaraútbúgving ella líknandi, er tað ein fyrimunur.

Tað er umráðandi, at tað fellur tær lætt at samskifta við viðurskiftafólk og starvsfólk, og at tú ert fyrikomandi.

**Løn**
Lønin verður ásett sambært nærri avtalu.

Hevur tú áhuga í hesum starvi, er tú vælkomin at ringja til Klæmint Weihe, á 216644 ella senda teldupost til kw@mvh.fo

**UM OKKUM**
MVH er nýstovnað felag, sum hevur til endamáls at umboða stórar og kendar fyritøkur innan entreprenørmaskinur m.a. Komatzu og Hydrema og Volvo bussar og lastbilar umframt at reka eitt dygdargott verkstað.
Vit hava sett okkum sum mál at gerast førandi innan verkstaðstøkni til vinnuna bæði á sjógvi og landi. Fyri at náa hesum endamáli, er neyðugt við dugnaligum starvsfólki og góðum hølisviðurskiftum. Tað er tí avgerð tikin um, at byggja nýtt verkstað á Hjalla, soleiðis at fyritøkan eisini kann verða savnað á einum stað seinni í summar.